## Damir Oros ivasamur til kappingarbyrjan

Serbiski bakspælarin hjá KÍF, Damir Oros, meiddi sær fótin í kappingini í Kollafirði í vikuskiftinum. Í síðsta dystinum leygarkvøldið beklaði hann illa, og hann mátti tí beinleiðis suður á landssjúkrahúsið, har hann kannaði fótin. Tíbetur fyri hann og kollfirðingar, so var fóturin ikki brotin, men nú er ivasamt, um Damir verður klárur til kappingarbyrjanina um 2 vikur.



## Seks føroyingar til OL

Kristian Martin Garðalíð og Meiken Olsen (frælsur ítróttur) og Súsanna Johannesen, Apolonia Justesen, Magnus V. Olsen og Ragnvald Jensen (svimjing) verða føroysku umboðini, tá Special Olympics fyri ungdóm verður hildið í Rom í næstum. Special Olympics eru leikir fyri menningartarnað, og roknað verður við 1.400 íðkarum úr 57 ymiskum londum.

# heimavøll



*Eftir at hava spælt sínar heimadystir í Havn, á Skála, Vestmanna og í Hoyvík, hevur KÍF nú sína egnu høll*

altíð hevði havt tað gott, bæði á Hálsi, á Skála og í Vestmanna, so var hoyvíkshøllin ein góð broyting hjá kollfirðingum, og hallarvørðurin, Alvin, var um leikarar, so teir við tað sama kendu seg sum heima. Bert 15 minuttir vóru til venjing, oh hetta var ein stór broyting. Vetrarkvøldini vóru ikki so strævin longur, nú koyrast kundi eftir kaldbaksvegnum. Kollfirðingar og hoyvíkingar høvdu tað gott saman í hoyvíkshøllini, og har var mong hørð lokaluppgerð kempað ímillum hesi bæði lið í høllini.

### Keðiligar umstøður hjá flogbóltinum

Men ikki bert hondbólturin hevði keðiligar umstøður. Flogbólturin í Kollafirði hevði tað so sanniliga eisini torført. Flogbóltur hevur verið spældur í Kollafirði í nógv ár, men miðskeiðis í áttatiárinum datt flogbólturin niðurfyri. Flogbólturin byrjaði aftur fyrst í nítiárunum við teimum yngru gentuliðunum, og síðani tá hevur gentuflogbólturin í Kollafirði verið góður, so góður, at júst hesar gentur nú manna tvey tey bestu liðini í Kollafirði.

Tað bleiv ein trupulleiki, tá tær fluttu upp í meistaradeildina, tí liðið hevði bert eina fimleikahøll at spæla í. Tær valdu tí, ikki at flyta upp, men ístøin at halda fram í 1. deild. Tá tær fyri aðru ferð fluttu upp í meistaradeildina var høllin í Hoyvík komin, og har blivu dystirnir hjá meistaradeildini spældir.

### Endiliga kom høllin

Eftir at KÍF var farið til Vestmanna at venja og spæla heimadystir, so var prátið ofta frammi, um KÍF ikki átti at gjørt eina høll í Kollafirði, og tað tyktist, sum fleiri og fleiri gjørdust samd um, at hetta var neyðugt.

Tá hallarprátið var upp á tað harðasta, bleiv atkvøðugreiðslu í Kollafirði um at leggja saman við Havnina. Ein av høvuðsorsøkunum til, at kollfirðingar valdu at leggja saman við Havnina var, at teimum varð lovað eina ítróttarhøll. Tað gekk rúm tíð, áðrenn byggingin av høllini byrjaði, og røddirnar í Kollafirði harnaðu við tíðini. Tað bøtti tó nakað um støðuna, at hoyvíkshøllin kom, og at kollfirðingar sluppu at venja og spæla í henni, eisini yngru deildirnar.

Men Havnin hevði ikki gloymt sítt lyfti um ítróttahøll í Kollafirði, tí nú stendur ein snotilig høll uppi í Kollafirði, og kollfirðingar kunnu fyri fyrstu ferð nakrantíð spæla sínar dystir á egnum heimavølli.

Vit vóru ein túr í Kollafirði leygardagin, har vit spurdu fólk, hvat tey hildu um høllina, og hvønn týdning høllin fór at hava fyri Kollafjørð.

### Holger Hansen, maðurin handan klokkuna:



*Hvussu dámar tær nýggju høllina?*
Eg haldi, at høllin er deiliga ljós, og so hevur hon sera góð áskoðarapláss, so eg eri heilt væl nøgdur.
*Hvønn týdning metir tú høllina hava fyri Kollafjørð?*
Høllin hevur sera stóran týdning fyri ungdómin. Nú hava tey eitt savningarstað í Kollafirði, og tað hava vit heilt sikkurt mangla.

### Dia Midjord, venjari hjá VÍF:



*Hvussu dámar tær nýggju høllina?*
Mær dámar høllina væl. Serliga málmansfeltið, sum hevur ein annan lit enn restin av gólvinum, haldi eg vera deiligt. Hetta ger eisini uppgávuna hjá dómarunum lættari.
*Hvønn týdning metir tú høllina hava fyri Kollafjørð?*
Hendan høllin hevur ótrúliga stóran týdning fyri Kollafjørð. Her er ein ótrúliga góð mentan í Kollafirði. Fólk hava koyrt í aðra bygd ella bý fyri at sleppa at venja, og tað vísir ein ótrúligan vilja. Harafturat hevur høllin stóran týdning fyri ungdómin, tí nú sleppa tey at venja fast í eini høll.

### Ella Joensen, flogbóltsleikari:



*Hvussu dámar tær nýggju høllina?*
Hetta er ótrúligt at fáa eina høll. Nú sleppa vit frá at fara av bygdini at venja. Sjálvt um eg eri sera glað fyri høllina, so er ein lítil trupulleiki. Vit flogbóltsleikarar brenna okkum ov illa av gólvinum, og tað kann til tíðir vera keðiligt.
*Hvønn týdning metir tú høllina hava fyri Kollafjørð?*
Høllin hevur ótrúliga stóran týdning. Børnini hava einki havt at fari til, men nú hava vit fingið eina høll, og her kunnu tey savnast. So vænti eg eisini, at felagið gerst ein betri heild, av tí at nú savnast øll á sama stað. Tað verður lættari at koma til venjing. Hetta ger, at fleiri av leikarunum halda fram við at spæla. Á henda hátt fáa vit størri úrval, so í longdini fer felagið heilt víst at fáa betri úrslit.

### Vagnur Johannesen, fyrrverandi spælari og venjari:



*Hvussu dámar tær nýggju høllina?*
Mær dámar væl at hava fingið eina hæll. Eg vóni, at høllin verður líka góð at spæla í, sum hon sær gott út.
*Hvønn týdning metir tú høllina hava fyri Kollafjørð?*
Hetta er størsta framstig innan bæði hondbólt og flogbólt í søguni hjá KÍF. Harafturat vænti eg, at høllin verður eitt savningarstað fyri bygdafólkið, og eg ivist ikki í, at í framtíðini fara vit eisini at síggja, at høllin fer at føra góð úrslit við sær.